## DAGSINS MEINING

# Oljuleiting og samstarv - frá GEM til SINDRI

Samstarv er lykilin til bestu loysnirnar, eitt nú tá útlendsk feløg gera íløgur í Føroyum til tess at leita eftir og troyta náttúrutilfeingi. Fyri tey fremmandu og fyri okkum. Fyri felags besta. Taka vit tilgongdina í oljuleiting við Føroyar seinastu 10 árini, so hevur samstarv nettupp verið eitt av amboðunum. Hetta er GEM-umhvørvisarbeiðið eitt gott prógv um. Hetta var ein framúr góð verkætlan, ið ikki átti sín líka nakra aðrastaðni í heiminum. Har øll oljufeløgini saman við føroyskum myndugleikum settu út í kortið eina umhvørvisverkætlan, ið hevur til endamál at tryggja eitt reint umhvørvi í kjalarvørrinum á oljuboringum og seinni framleiðslu. Herfyri kom út bóklingur, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt í samstarvi við Innlendismálaráðið og Føroya OljuÍdnaðar Bólk (FoíB) um umhvørvi og oljuleiting: "Umhvørvi og oljuleiting, umhvørvislig krøv og kanningar á føroyskum øki". Eitt frálíkt tiltak. Hóast oljusøgan enn er ung, er greitt, at oljuvinna kann gerast ein týðandi partur av gerandislívinum hjá komandi ættarliðum. Og tí eigur slíkt tilfar at vera ein náttúrligur partur av undirvísingini í skúlunum.

Endamálið við bóklinginum er at lýsa, hvussu fyrilit fyri umhvørvisvernd hava verið tryggjað gjøgnum alla gongdina, frá tí at eitt oljufelag fer undir at gera ætlanir fyri leitivirksemi, og til eftirkanningar rundanum sjálvt boriholið eru gjørdar. Bóklingurin gevur innlit í, hvussu oljuleiting fer fram, og hvørji umhvørvislig krøv oljufeløgini skulu lúka, áðrenn loyvi fæst til at seta borin í føroysku undirgrundina. Bóklingurin gevur eisini eitt yvirlit yvir tær umhvørviskanningar, ið gjørdar vórðu, áðrenn og aftaná at fyrsta leitiumfar fór av bakkastokki. Endamálið við umhvørviskanningunum er at geva myndugleikum og oljufeløgum eitt støði at meta um, hvørji árin leitiboringarnar hava á føroyska umhvørvið, og fyri at staðfesta møguliga dálking. Kanningarnar eru í flestu førum gjørdar av føroyskum myndugleikum, stovnum og granskarum, við fíggjarligum stuðli frá oljufeløgunum verður greitt frá í skrivi frá stigtakarunum. Bóklingurin er ætlaður øllum, ið hava áhuga fyri umhvørvi og oljuleiting, og hevur ætlanin verið at gjørt eina lættlesiliga frágreiðing við nógvum myndum og talvum. Allir teir hægru og miðnáms skúlarnir fáa eitt flokssett av bóklinginum sendandi.

Á oljutinginum mikukvøldið var bóklingurin umrøddur og gjørdi ein rithøvundunum greitt, at oljufeløgini, ið leita eftir olju við Føroyar, er tey, sum eru mest miljøbevíst. Hetta er gott skoðsmál at fáa og sigur eisini, hvussu týdningarmikið samstarvið millum føroyskar myndugleikar og feløgini er. Hetta samstarv byrjaði við GEM og síggja vit nú fruktirnar av tí. Sama oljuting umrøddi eitt annað samstarv, SINDRI, har oljufeløg og myndugleikar í felag seta út í kortið langtíðar kanningarætlanir, ið skulu gagna framtíðar menningini her á landi. Sjálvandi ræður um at arbeiða miðvíst og skjótt til tess at finna oljuna, men harafturat ræður eisini um at hugsa longur fram, og her er samstarvið í Sindri av stórum týdningi, eitt nú fyri at skilja, hvussu øll okkara undirgrund sær út og hvat hon kann goyma. Latið okkum menna slíkt samstarv fyri harvið eisini sjálvi at gerast betri før at taka ímóti framtíðar avbjóðingum. Og latið okkum gera tað sum framhald av tí slóðbrótandi arbeiði, ið okkara frægi jarðfrøðingur, Jóannesi Rasmussen, sáli stóð fyri. Latið okkum fullføra hansara verk.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú líta vit fram - við takksemi

**Fyrst og fremst: Stóra tøkk til Føroyar fyri blíðskap, áhuga og stuðul, sum tit vístu okkum í sambandi við ráðstevnuna um samkynd, sum Bogin herfyri helt fyri ANSO: Norðurlendska samtakið av feløgum fyri lesandi og ung, ið eru samkynd**



**Manijeh Elsa Modi**
*Forkvinna í Bogan, - felagið fyri samkynd lesandi og ung*

Tøkk til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum Hans Paula Strøm, løgtingsmenn fyri Tjóðveldis- og Javnaðarflokkin: Finnur Helmsdal og John Johannessen, tøkk til tænastuveitarar og pressuna. Stóra tøkk til framúr tónleikarar: Jens Marna, Hanus, og Havnarkórið við Ólavi Hátún á odda.

Tit gleddu okkum, og gjørdu okkum løtuna í miðbýnum so hugnaligan. Fyri fyrstu ferð kendist tað hjá nógvum samkyndum sum um, at vit høvdu eitt pláss í samfelagnum her heima á klettunum. Tøkk til tykkum, sum við lesarabrøvum og øðrum, gjørdu vart við okkara støðu, og tykkara stuðul til ábótur tess. Tøkk til Amnesty, sum ger vart við mannarættindini hjá okkum, sum hjá øllum øðrum. Tað rørdi hjartastreingir, og gleðir mangt eitt sárt hjarta.

Nú síggja vit aftur ljós fyri framman: Kanska ber tað allíkavæl til, at seta lóggávu í verk í Føroyum, sum verjir um tey samkyndu á sama hátt sum hinir minnilutar: Smá trúarsamfeløg, fólk við øðrum húðaliti /uppruna osv. T.d. munnu flest halda, at øll skulu hava somu løn fyri sama arbeiði - eisini tey samkyndu. Tað kann lógin um "Forboð móti mismuni á arbeiðsmarknaðin" tryggja teimum samkyndu, á sama hátt sum tað verjir aðrar minnilutabólkanir í samfelagnum. Vit vilja tí mæla til eitt uppskot, sum er soljóðandi (haldi mær til góðar við donsku orðingarnir):

A) Lov om forbud mod forskelsbehandling på grund af race m.v.

[lov nr 289 af 9. juni 1971 med ændringer af lov nr. 357 af 3. juni 1987]

§ 1. Den, som inden for erhvervsmæssig eller almennyttig virksomhed på grund af en persons race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse, tro eller seksuelle orientering nægter at betjene den pågældende på samme vilkår som andre, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 6 måneder.

Stk. 2. På samme måde straffes den, som af nogen af de i stk. 1 nævnte grunde nægter at give en person adgang på samme vilkår som andre til sted, forestilling, udstilling, sammenkomst eller lignende, der er åben for almenheden.

§ 2. Loven omfatter ikke uagtsomt forhold.

§ 3. Er en af de i § 1 nævnte overtrædelser begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 4. Sager om overtrædelse af denne lov behandles som politisager.

(Ein nógv meira umfatandi arbeiðsmarknaðarlóg er nú komin í gildi í Danmark - sum tó tikist ov umfatandi, at taka til viðgerðar í Føroyum.)

Aftrat arbeiðsmarknaðinum finnast tær báðar paragraffirnar í revsilógina - eitt sum umfatar princippir fyri døming av brotsverkum, og eitt fyri niðrandi almenn úttalilsi:

B) § 81. Det skal ved straffens fastsættelse i almindelighed indgå som skærpende omstændighed,

1) at gerningsmanden tidligere er straffet af betydning for sagen,

2) at gerningen er udført af flere i forening,

3) at gerningen er særligt planlagt eller led i omfattende kriminalitet,

4) at gerningsmanden tilsigtede, at gerningen skulle have betydeligt alvorligere følger, end den fik,

5) at gerningsmanden har udvist særlig hensynsløshed,

6) at gerningen har baggrund i andres etniske oprindelse, tro, seksuelle orientering eller lignende,

7) at gerningen er begået i udførelsen af offentlig tjeneste eller hverv eller under misbrug af stilling eller særligt tillidsforhold i øvrigt,

[…]

C) Lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: Straffeloven, som senest ændret ved anordning nr. 134 af 2. marts 2004.

§ 266 b. 34) Den, der offentligt eller med forsæt til udbredelse i en videre kreds fremsætter udtalelse eller anden meddelelse, ved hvilken en gruppe af personer trues, forhånes eller nedværdiges på grund af sin race, hudfarve, seksuelle orientering, nationale eller etniske oprindelse eller tro, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Hesar paragraffir gera ikki annað enn, at geva samkyndum somu rættindi, sum eitt nú smá trúarsamfeløg í Føroyum fáa til tess at tryggja teirra mannarættindi. Soleiðis kunnu øll virka og liva í frið við vernd frá lógávuvaldinum.

Vit vóna, at ráðstevnan og orðaskiftið var við til at varpa ljós um korini hjá teimum samkyndu, og tær ábótur í lóggávuni, sum høvdu bøtt um lógarrinnar vernd av teirra mannarættindi, á jøvnum føti við hinum minnilutunum: Trúgv, etniskan og nationalan uppruna, húðalit osv. Øll hava vit loyvi at vera her á - síð um síð. Sum Eygló Aradóttir úr Íslandi segði: Minst 55 % av føroyingum eru í familju við, ella kenna onkran sam-

*Framhald á síðu 11*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.